

## Meinigheitshúsið fingið Myspace

Allir tónleikarar við respekt fyri sær sjálvum hava ein Myspace-profil. Hetta er galdandi fyri føroyskur og útlendskar – bólkar og einstaklingar.

Síðan er tað blivið alsamt meir vanligt hjá einstaklingum at gera sær ein profil fyri at samskifta við vinir og kenningar.

Nú er enn eitt fyribrygdi at hóma innan myspace. Tað er at eisini samkomur og felagsskapir hava fingið sær ein profil fyri m.a. at kunna um komandi tiltøk og vísa myndir frá farnum tiltøkum.

Meinigheitshúsið í Havn hevur nú eisini fingið ein profil. Hesin profilur er tó serliga ætlaður ungdómsarbeiðinum í húsinum. Profilurin er at finna á *www.myspace.com/meinigheit*

Magni Arge, stjóri á Atlantsflog:

# Havi alla tíðina roknað við kapping

**Stjórin á Atlantsflog er ikki bangin fyri kapping frá Sterling, skuldi hon komið. Hann vísir á, at felagið í veruleikanum altíð hevur verið í kapping við onnur flogfeløg.**

FLOGFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað verður ofta havt á lofti, at tað er ósunt, at bert eitt flogfelag røkir farleiðina til og úr Føroyum. Og tað kann vera nakað um tað. Men Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, vísir á, at talan í veruleikanum bert hevur verið um eitt ár ella so við ongari kapping á rutuni.

- Heilt frá tí Atlantsflog varð sett á stovn og fram til 2004 høvdu vit kapping frá Maersk, og síðani hava bæði DAT og FaroJet verið á rutuni. So tíðin við ongari kapping hevur ikki verið so long tá samanum kemur, sigur Magni Arge.

So um Sterling skuldi gjørst ein kappingarneyti á rutuni, førur ikki til svøvnleysar nætur hjá Magna.

- Sjávlandi skapar tað aðrar fortreytir, men tað er ikki nakað nýtt, tí eg havi alla tíðina roknað við kapping á økinum, sigur stjórin hjá Atlantsflog, sum eisini vísir á, at við longdari flogbreyt verður møguleikin hjá størri flogførum at seta seg í Vágum.

### Bíða spent eftir ECAA

Sum nevnt aðrastaðni á síðuni verður í løtuni arbeitt við at útvega Føroyum limaskap í europeiska flogferðslusamtakinum ECAA. Í stuttum merkir hesin limaskapur, at ístaðin fyri at vit byrgja okkum inni í Føroyum, verður latið upp fyri møguleikanum at kappast frítt á øllum rutum í Europa.

Tað virkar so sjálvandi báðar vegir soleiðis, at onnur flogfeløg fáa frítt at flúgva upp á Føroyar, skuldu tey ynskt tað.

Magni Arge sigur, at eftir hansara tykki er hetta rætti vegurin at ganga, tí tað letur upp fyri stórum møguleikum hjá føroyska flogfelagnum. Samstundis fer hetta eisini at krevja, at allar góðar kreftir savnast um eitt sterkt føroyskt flogfelag.

Hjá Atlantsflog bíða tey spent eftir hesum limaskapi, sum sambært Magna Arge skuldi verið havt verið veruleiki longu 1. januar 2007 í sambandi við komandi privatiseringina av felagnum.




*Sjálvandi skapar tað aðrar fortreytir, um annað flogfelag kemur á Føroyarutuni, men tað er ikki nakað nýtt, eg havi alla tíðina roknað við kapping, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog.*
*Savnsmynd*

3. loftferðslupakkin hjá ES:

# ECAA brýtur upp úr nýggjum

**Arbeitt verður í løtuni við at Føroyar gerast partur av sonevndu ECAA-avtaluni, og tá tað er veruleiki, verður tað fullkomiliga frítt hjá Atlantsflog at flúgva allastaðni í Europa.**

FLOGFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í tosinum um kapping á Føroyarutuni, tykist eitt lyklaorð at vera ECAA-avtalan. Hetta er samstarvsavtala millum ES og triðjalond í Europa í sambandi við flúgving og merkir í stuttum, at flogfeløg kunnu flúgva frítt til øll lond í Europa uttan framman undan at søkja um koncessión.

Tað vil so siga, at tá Føroyar verða partur av hesi avtalu, sum vanliga verður nevnd 3. luftfartspakkin hjá ES, kunnu øll europeisk flogfeløg frítt flúgva upp á Føroyar uttan at biða um loyvi frammanundan.

Men tað merkir so eisini, at Atlantsflog fær somu møguleikar runt um í Europa. Og tað metir Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, vera avgerandi fyri, at føroyska flogfelagið kann menna seg.

Løgmaður hevur í samráð við Uttanlandsnevndina tikið upp samráðingar við ES um føroyska innliman í avtaluni. Í grundini er flogferðsla eitt mál undir Vinnumálaráðnum, men av tí at talan eisini er um uttanríkismál, ið løgmaður umsitur, er tað hann, sum tekur sær av hesum.

- Vit eiga eftir mínum tykki at yvirtaka loftferðsluøkið, serliga vit nú vit yvirtaka flogvøllin. Men at yvirtaka eitt slíkt mál tekur drúgva tíð. Talan er um nógvar altjóða bindingar og fyrireikingar, sigur Bjarni Djurholm.

Og landsstýrismaðurin undirstrikar, at tað hevur stóran týdning at gerast partur av ECAA í hesum sambandi.

- At gerast partur av slíkari avtalu brýtur heilt einfalt burtur úr nýggjum, sigur landsstýrismaðurin.



*Tá Føroyar gerast partur av EACC-avtaluni, verður frítt hjá flotanum hjá Atlantsflog at flúgva til øll lond í Europa.*
*Savnsmynd*